TILTØK

Meinigheitshúsið
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Gunnar Reynslág.

Frelsunarherurin, Tórsgøta 19
Sunnudagin kl. 11 Møti. Eingin sunnudagsskúli, men kl. 17 Familjumøti. Drekkamunnur aftaná.
Mánadagin kl. 17 og 19 Skótamøtir.

Lívdin
í Hoyvíkar skúla
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 er evnið: »Náði Guds í lívi Mósesar« og tilbiðjanarmøti er kl. 12, á báðum møtunum talar Øssur Andreassen. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum, kl. 12
Sunnudagsskúli.
Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið kl. 20 (í eini skúlastovu) Bøn og bíliutími har Jógvan Z. undirvísir um Opinberingina kap. 19.
www.livdin.fo

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Hildu og Erik Bedesvaag, einki ABC vegna vitjan, kl. 11.50 Barnagudstænasta, kl. 18 Evangel. møti v/ Rúna Rasmussen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin. www.filadelfia.fo

Samkoman Rhema
Sunnumorgun kl. 11 Møti og Sunnudagsskúli. Biðið verður fyri sjúkum.
www.rhema.fo

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Eingi møti verða sunnudagin vegna møti í Betania í Skopun.

KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Sólbjørg Símunarson. Evnið: Móses.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.
Týsdagin kl. 19.30 í KFUM: Kristiliga sangkórið venur. Nýggir sangarar eru vælkomnir við.

Kirkju og missiónshúsið á Argjum
Sunnudagin 21. mars Møti – Tey ungu.

Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við breyðbróting v/ Jóhan Hendrik Hansen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøldið opið hús fyri ung kl. 20.

Miðvágs Missiónshús
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Dávid Johannesen. Hjartaliga vælkomin.

Keldan, Skálafirði
Møtini við Erik og Hildu Bedsvaag byrja hóskvøldið kl. 20, halda fram leygarkvøldið kl. 20 og sunnudagin kl. 17, Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

Missiónshúsið Tabor á Toftum
Felags ungdómsmøti fyri alla Eysturoynna verður í kvøld kl. 20. Hjallmar Hansen úr Rituvík talar. Drama og sangur er eisini á skránni.

Gøta
Vegna felagsungdómsmøti í Missiónshúsinum á Toftum verður einki ungdómsmøti í kirkjukjallaranum í kvøld.
Bussur koyrir frá kirkjuni í kvøld uml. kl. 19.30 út á Toftir. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Thabor, Fuglafjørður
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli á Kambsdali og í Thabor og kl. 18 Møti.
Savnað verður inn til Leguhúsið í Nesvík.

Lívsins Orð, Saltangará
Sunnudagin kl. 10.30 Møti við Símun Jaocbsen.
Mánadagin kl. 17.30 TIM5 og kl. 20 Ungdómsmøti.

Missiónshúsið í Leirvík
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ Árna Jacobsen, kl. 21 Ungdómsmøti v/ Pól Johannesen, Hvannasund.

Getsemane, Klaksvík
Sunnudagin kl. 18 Møti við Sannu Hammer.

Soli Deo Gloria
Leygardagin kl. 14 Undirvísing í lovsangi, kl. 21 Opið hús. Team úr Kolding lutteku til øll tiltøkini.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við luttøku úr Vágum.

KFUM og K, Klaksvík
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti við Finn Johannesen, kl. 21 Ungdómsmøti.

Saron, Viðareiði
Sunnukvøldið kl. 18 Evangel. fundur har Levi Joensen og aðrir tala, sangkreftir úr Betesda luttaka, øll eru vælkomin.

Betania, Skopun
Leygardagin kl. 11 Smáir einglar møtia, kl. 14 Sólstrálan, kl. 17 Striðsmenn møta.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, luttøka úr Skansastovu, kl. 18 Evangel. møti, luttøka úr Skansastovu.

Missiónshúsið í Skopun
Í kvøld kl. 20 Møti v/ Johan Petur Johannesen.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsongsløta, kl. 18 Møti.
Mánadagin kl. 17 Barnarbeiðið 1.-6. fl og kl. 19 Ungdómsarbeiði frá 7. fl. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Sands missiónshús
Sunnudagsskúli kl. 14.30.
Kl. 18 Møti, sangur, Terji, Egin, Sølvi o.a. Tú ert vælkomin.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Einki møti verður sunnukvøldið vegna missiónsviku í Vági.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

Missiónshúsið í Vági
Missiónsvikan heldur fram í kvøld kl. 20 við Regin Høgnesen, barnakór úr Sumba luttekur.
Sunnukvøldið kl. 18 við somu, Ebba og Nimrod luttaka. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Frelsunarherurin, Vágur
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, Eyðun Christiansen talar. Hetta er síðsta møti í gamla húsinum.

»Eitt umbroytt lív«
møtir verða í samkomuni í Sion í Vági frá hósdegnum 18. til mánadagin 22. mars. Møtini byrja kl. 19.30 hvørt kvøld, tó sunnukvøldið kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Sion, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti og Bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

Jesus segði við teir: »Eg eri lívsins breyð.
Tann, sum kemur til mín, skal ikki hungra,
og tann, sum á meg trýr, skal aldri tysta.«

Jóhs. ev. 6, v. 35.

Samanhangurin hendingin og teksturin eru frá, siga okkum orsøkina til, at Jesus brúkar hesa myndina um seg sjálvan.

Dagin fyri hevði Jesus gjørt eitt undur. Burtur úr einum matpakka hjá einum smá-dreingi, sum var fimm breyð og tveir fiskar, hevði hann skapað nóg mikið av føði til 5000 menniskju í oyðumørkini. Hendingin vakti undran og ans millum fólkið. Tí ynsktu tey at gera Jesus til teirra kong.

Men Jesus helt seg undan. Ein kongur eftir teirra hugsan og ynskjum, vildi hann ikki verða. Í undurinum høvdu tey ikki sæð annað enn tað, tey høvdu upplivað. Sjálvt tekinið aftan fyri undurið høvdu tey ikki sæð.

Undurið hevði nevnuliga ein dupultan botn. Umframt at vísa Guds umsorgan fyri teirra likamliga tørvi, peikaði tað á HANN, sum undurið gjørdi, at HANN er breyðið, sum er komið av himni, fyri at geva heiminum lív.

Samrøðan, Jesus hevði við Jødarnar um tað himmalska breyðið, peikar aftur á eina hending í Ísraels søgu.

Tað er undurið, sum forfedrarnir upplivdu í oyðumørkini, á ferðini úr trældómi í Egyptalandi til frælsið í tí lovaða landinum. Tá teimum tørvaði mat í oyðumørkini, læt Gud manna regna niður av himni, so at tey kundu eta seg mett. Og vatnið læt hann vella fram úr klettinum, so at tey kundu sløkkja tostan. Soleiðis læt Gud Ísraels fedrar uppliva sína umsorgan fyri teimum, eisini teirra likamliga tørvi.

Tað er hetta sama, Jesus peikar aftur á, tá hann longur úti í hesum tekstbrotinum sigur: »Eg eri livsins breyð. Fedrar tykra ótu manna í oyðumørkini og doyðu. Hetta er breyðið, sum er komið niður av himli, at tey skulu eta tað og ikki doyggja.«

Mannaundurið í oyðumørkini tá, og undurið Jesus hevði gjørt dagin fyri, tá hann mettaði tey 5000, vóru bara tekin. Tey peikaðu á nakað annað og meira.

Og hetta annað og meira er Jesus sjálvur. Í honum eru Gud og menniskja knýtt saman aftur. Soleiðis er tann, sum er knýttur at Jesusi Kristi, eigur lut í øllum tí, sum hansara er.

Jesus eigur lut í tí æviga lívinum, sum merkir Guds frelsa og gáva, her í tíðini og um allar ævir. Tí lovar Jesus tí, sum hoyrir honum til, uppreisn og ævigt lív.

Og hetta lyfti er ætlað einum og hvørjum av okkum: »Alt, sum faðirin gevur mær, skal koma til mín, og tann, sum kemur til mín, skal eg als ikki reka burtur.« (v. 37).

Jesus sum lívsins breyð verður givin okkum í orðinum. Men týðuligast opinberar Jesus seg fyri okkum sum lívsins breyð við altarborðið. »Hetta er likam mítt sum fyri tykkum verður givið.« Sama sigur hann um vínið sum blóð sítt. Eftir Jesu egnu fyriskipan og orði er nakað so neyðarsligt sum breyð og vín berarar av Jesusi sjálvum, givið okum til lívs. Fyri okkara vit og skil ein ófatuligur tanki, men enn ein vitnisburður um, hvussu stórur Gud er, at hann hevur ráð til at vísa seg størstan í tí minsta.

Jónsvein Bech, sóknarprestur

SØKT VERÐUR EFTIR FÓLKI
til gávudeildina í Idé Møblum

Idé møblar sóknast eftir einum evnaríkum og miðvísum fólki, ið kundi hugsað sær arbeiði í okkara spennandi møblahúsi.

Okkurt um teg
Vit vænta av tær, at tú hevur hug at arbeiða við spennandi gávulutum, ið seta dám á føroysku heimini. Tú hevur sjálvsálit, ert fyrikomandi og opin.

Okkurt um okkum
Vit bjóða eitt spennandi starv í einum nútímans møblahúsi, ið setir tænastuna í hásæti.

Umsókn
Send eina stuttorðaða lýsing til okkara skjótast gjørligt. Vit kundu hugsað okkum, at tú byrjar sum skjótast, men vit bíða fegin eftir tí rætta.
Um áhugi er fyri tí, kann eisini verða talan um at koma í læru.

IDEmøblar
Uppi á Hálsi · Tel 35 46 80

P/F ALMA
Maskinverkstaður & Smiðja
Munters
The Humidity Expert

Munters produktini avfukta kølirúm, frystirúm og aðrar goymslur, produktiónshølir, teknikkrúm, turkirúm, garagur, loftsrúm og kjallarar við kondenstrupulleikum, eins og onnur hølir har fukt ella kondens kann gera skaða, ella um eitt turrari umhvørvi er eitt ynski ella krav.

Á hjalla 15 · Boks 1338 · 110 Tórshavn · tel 31 58 90 · fax 31 04 68 · henrik@alma.fo

TILTØK

Betania, Sumba
Møti verður í kvøld og sunnukvøldið kl. 20. Á møtinum í kvøld verður luttøka úr Salem, Tvøroyri.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagur 22. mars
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.15-18 Myndaveving á loftinum
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan miku- og fríggjadagin tlf. 316491
Týsdagur 23. mars
kl. 10-11.30 Sangur, Jóhann R. Jacobsen.
kl. 14.30 Ein tími í føroyskum, Bergljót av Skarði
Mikudagur 24. mars
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 15 Túrur eftir gøtuni niðan á Nabb og oman gjøgnum viðalundina
kl. 17-21 Opið hús
Hósdagur 25. mars
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen.
kl. 14-17 Teldupræt, Brandur Petersen
kl. 14-17 Boccia í kjallaranum
Fríggjadagur 26. mars
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 13-17 Opið hús

Tað er altið ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Tilhaldið Hugnin í Sandoynni
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánadagin 22. mars
Upplestur
Mikudagin 24. mars
Boccia. Vit spæla boccia í Virkinum á Sandi. Vit byrja kl. 14 við løttum fimleiki og síðani heldur kappingin millum reyða og bláa liðið fram.
Leygardagin 27. mars fara vit til Havnar til Boccia kapping í Gundadalshøllini. Vit fara við bussi úr Tilhaldinum kl. 10.00 og úr Skopun við Teistanum kl. 10.30. Vit eta døgurða á Sjómansheiminum áðrenn kappingina, ið byrjar kl. 12. Kappingin er væntandi liðug kl. 15. Tað er neyðugt at tekna seg til túrin í seinasta lagi mikudagin 24. mars í Tilhaldinum ella á tlf. 361990.

Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar
í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensionistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 15-18.
Mánadagin 15. mars
Fimleikur v/ Jóhannu Troest
Týsdagin 16. mars
Ítriv fyri áhugað
Mikudagin 17. mars
Prát og sangur
Hósdagin 18. mars
Opið hús
Fríggjadagin 19. mars
Stongt.

Tú fært altið ein góðan drekkamunn, somuleiðis eitt gott Guðs orð. Bløðini eru altið til taks. Ver hjartaliga vælkomin í Fløvan.

Vágs Pensionistafelag
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmødrafelag. Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

Dagtilhaldið í Vági
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

Spælistovan í meinigheitshúsinum
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

Føroya Heimavirksfelag
Postadressa: J. Paturssonargota 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

NA (Anomymir narkomanar)
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

ACA
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com

AA-fundir í Havn
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00 Sunnudag: kl. 11.00–12.00. Allir fundir eru roykfriir.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

ÚF
Morgunlestrar
22.–27. mars

Hallgrím Johannesen á Skála lesur

Sálmar:

Mánadagin 22. mars:
nr. 167 Harri, í hesi føstutíð
nr. 406 Bið, o, Jesus, fyri mær

Týsdagin 23. mars:
nr. 166 Aftur føstuklokkan ljóðar
nr. 315 Givnir eru einglar góðir

Mikudagin 24. mars:
nr. 168 Legg nú niður verðsligt sinni

Hósdagin 25. mars:
nr. 169 Jesus lív mítt lívgað hevur

Fríggjadagin 26. mars:
nr. 171 Jesus, tíni sár og pína

Leygardagin 27. mars:
nr. 172 So elskar Guð oss, at hann gav

BRÚDLEYP

3. apríl giftast Teresa Johnsson, Kollafjørður og Thomas Andersen, Keypmannahavn, í Cafékirken Suomisvej 5, Frederiksberg C, kl. 14.00.
Brúdleypsadr.: Sonnerupgaard Gods, Tølløsevej 53, 4330 Hvalsø.

Leygardagin 3. apríl kl. 15.00 giftast í Laurbjerg Kirke, Kirkevej, Laurbjerg, Jórun Højgaard, Tórshavn og Høgni av Skarði, Laurbjerg. Brúdleypsadr.: Den Hvide Skole, Skolevej 1, Laurbjerg, 8870 Langå.

Mikudagin 7. apríl kl. 15.30 giftast í Tvøroyrar kirkju Malan Danielsen, Trongisvágur og Dia Petersen, Hov. Veitsla verður um kvøldið kl. 19.00 í skúlahøllini í Trongisvági. Tey, sum vilja gleða brúðarparið við at koma, vera biðin at boða frá áðrenn 20. mars á tlf. 321817 ella 229654.

Leygardagin 10. apríl giftast Rannvá Barbara Poulsen og Helge Joensen, bæði av Tvøroyri. Vígslan verður í Tvøroyrar kirkju kl. 16.00. Veitslan verður hildin fyri innbodnum í høllini í Trongisvági kl. 19.00.

Leygardagin 10. apríl kl. 13.00 giftast í Miðvágs kirkju Berit Johannesen og Tejs Mogensen. Reseptión verður kl. 14-17 hjá Sonju og Ibert Johannesen í Miðvági. Aftaná verður døgurði fyri innbodnum.

Leygardagin 24. apríl kl. 16.00 giftast í Christiansskirkjuni Óluva Archibaldsdóttir, Tórshavn og Klavus Bjartalið, Klaksvík. Veitslan verður hildin í Skálanum kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp kunnu ringja á tlf. 455343, 225825, 456489 ella 457284 í seinasta lagi 10. apríl.

SILVURBRÚDLEYP

Mikudagin 24. mars hava Bergfríð og Johan Sørin Berg, Hvalba, verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin 20. mars í Roynhøllini kl. 19.

Fríggjadag 9/4 til mánadag 12/4

Vikuskiftisferð

Hvat við at gerða vikuskiftisferð til Reykjavíkar frá fríggjadag-mánadag við innivist í deildum dupultkamari v/morgunmati á Ørkini.

Fyri hvønn í tveymanskamari
2.495,-
Eyka fyri einakamar alt vikuskifti kr. 250,-

Mánadag 5/4 til mánadag 12/4

Vikuferð

Vikuferð til Reykjavíkar við innivist í deildum dupultkamari v/morgunmati á Ørkini frá mánadag - mánadag.

Fyri hvønn í tveymanskamari
3.610,-
Eyka fyri einakamar fyri alla vikuna kr. 500,-

Íroknað er ferð báðar vegir, gisting og ferðaavgjald.

Bilegging hjá Atlantic Airways og øllum ferðaskrivstovum.
Vanligir ferðaseðlar kunnu bileggjast á atlantic.fo

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Faks 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo

SANGIR 365 365

HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo

Leygardagin 20.03. kl. 21[00]
Sunnudagin 21.03. kl. 19[30]

Leygardagin 20.03. kl. 18[45]
Leygardagin 20.03. kl. 23[30]
Sunnudagin 21.03. kl. 22[15]

Leygardagin 20.03. kl. 23[00]
Sunnudagin 21.03. kl. 22[00]

Leygardagin 20.03. kl. 20[30]
Sunnudagin 21.03. kl. 20[30]

Leygardagin 20.03. kl. 18[15]
Sunnudagin 21.03. kl. 18[15]

KOMANDI FILMUR

Frumsýning
Fríggjadagin 23.04. kl. 18[00]
Fríggjadagin 23.04. kl. 20[45]
Fríggjadagin 23.04. kl. 23[30]
Leygardagin 24.04. kl. 18[00]
Leygardagin 24.04. kl. 20[45]
Leygardagin 24.04. kl. 23[30]
Sunnudagin 25.03. kl. 17[00]
Sunnudagin 25.03. kl. 19[45]
Sunnudagin 25.03. kl. 22[30]
Mánadagin 26.04. kl. 17[00]
Mánadagin 26.04. kl. 19[45]
Mánadagin 26.04. kl. 22[30]
Týsdagin 27.04. kl. 17[00]
Týsdagin 27.04. kl. 19[45]
Týsdagin 27.04. kl. 22[30]
Mikudagin 28.04. kl. 17[00]
Mikudagin 28.04. kl. 19[45]
Mikudagin 28.04. kl. 22[30]
Hósdagin 29.04. kl. 17[00]
Hósdagin 29.04. kl. 19[45]
Hósdagin 29.04. kl. 22[30]
Forsølan er byrjað